**Mentamálaráðið**
*Vinnu- og Miðnámsskúladeildin*

# Avloysari fyri Undirvísingarleiðara

(Teknisku skúlarnar)

***Starvið***

Vegna farloyvi er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum undirvísingarleiðari leyst at søkja í Vinnu- og Miðnámsskúladeildini. Setanartíðin er frá 1. august 2002 til 1. juli 2003.

Høvuðsuppgávurnar hjá undirvísingarleiðaranum verða m.a. at:

- Leggja til rættis og menna útbúgvingarnar serliga innan tað tøkniliga økið
- Ráðgeva og vegleiða í spurningum innan økið, tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a.
- Málsviðgerð
- Samskipa virksemið við tilknýti til økið við aðrar deildir, stovnar og áhugafelagsskapir
- Fremja samstarv við vinnulívið o.o., ið varða av økinum

Undirvísingarleiðarin skal tryggja, at nevndu uppgávurnar verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at mannagongdir eru í samsvari við nútímans krøv.

***Førleikakrøv***

Vit vænta okkum m.a. at umsøkjararnir hava

- Viðkomandi hægri útbúgving
- Góð samstarvsevni og hug at arbeiða í bólkum
- Førleika at menna samstarvið við vinnulívið og áhugafelagsskapir
- Áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir

***Vit bjóða***

Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing og mentan.

***Setanar- og lønartreytir***

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um aðalstýrini, Løgmansskrivstovuna og deildir tess.

***Umsókn***

Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skulu sendast til:

Mentamálaráðið
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. juli 2002.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Eyðgunn Samuelsen, deildarstjóra, á tlf. 355050.

***Mentamálaráðið*** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.
***Økið hjá Vinnu- og Miðnámsskúladeildini*** fatar um studentaskúlarnar, HF-skeiðini, handilsskúlarnar, teknisku skúlarnar, Fiskivinnuskúlan, sjómansskúlarnar, Maskinmeistaraskúlan og lærlingaútbúgvingar.



Grannskoðaravirki Højmose, FRR
v. Børge Christiansen, Cand.merc.aud.
Reg. revisor
Í Heiðum · 370 Miðvágur
Tlf. 333498 · telefax 333490
E-mail: hoejmose@post.olivant.fo
www.rev-hoejmose.dk

## Bogholder/revisor-assistent - deltid

Jeg har brug for en erfaren bogholder til at hjælpe med at bogføre hos en klient i Tórshavn 1–2 timer om ugen. Det kan godt foregå om aftenen.



## LFÚ-Ráðgevingin

er stongt vegna summarfrí 3.-29. juli '02.

## LFÍ-Skrivstovan

er opin sum vanligt
mánadag & mikudag kl. 12.00-16.00
& týsdag kl. 16.00-18.00.

**Landsfelag Føroyinga í Útbúgving**,
Tinghúsvegur 18, 3. hædd, 100 Tórshavn
Tlf. 310220 · Fartlf. 222131 · e-mail: lfu@post.olivant.fo



Sosialurin
*Lesið Sosialin - tað loysir seg*


## HEILSANIR



**Góði stóribeiggi**
Hjartaliga tillukku við 12 ára degnum. Vit eru stoltir av tær.
**Heilsan Hans Edmund og Teitur**



**Góða langomma!!**
Hjartaliga til lukku við føðingardegnum 30.06.
Takk fyri at tú ert so góð við okkum
**Kærar heilsanir Jona, Rebecca og Karl**




# Handilslærlingur

Søkt verður eftir lærlingi til handil okkara at byrja skjótast tilber, tó kunnu vit bíða eftir tær, um tú verður liðugur í handilsskúlanum nú.
Arbeiðið umfatar alt vanligt handilsarbeiði so sum kundaavgreiðslu, útkoyring og bilegging av vørum og goymsluhald v.m.

Tað er eitt krav, at tú hevur koyrikort og HH ella FHS. Lærutíðin er 2 ár við HH og 3 ár við FHS. Partur av lærutíðini gongur fyri seg í skúla í Danmark.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, dugir væl at umgangast fólk og ikki er bangin fyri at arbeiða sjálvstøðugt og taka eina ábyrgd.

Um tú ert tann rætti, kunnu vit bjóða tær spennandi lærutíð við nógvum spennandi avbjóðingum, sum tú kann hava stóra gleði av seinni í lívinum.

Eru spurningar hesum viðvíkjandi kunnu tit ringja til okkum á tlf. 311071.

Umsóknir við viðmælum verða at senda til okkum í seinasta lagi 22.07.02.

demich
**Stiðjagøta 2 - Postboks 378**
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 31 10 71
Telefax +298 31 04 60
e-mail: demich@demich.fo




## HEILSANIR



**Góði Mortan**
Hjartaliga tillukku við studentspróvnum. Her ert tú lítil drongur. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja vit øll Gumma og guðsonurin í Kvívík**



**Jens Olivur 25 ár**
Føðingardagsbarnið er at hitta undir kappróðrinum á keiini í Vági, øll eru vælkomin.



**Góði Pauli**
Hjartaliga tillukku við 11 ára degnum, sum var tann 26. juni. Takk fyri at tú er so góður við okkum.
**Heilsan Heiðrun, Jóhan, Annfinn og Tummas Óli**



**Góði elskaði Jacob**
Hjartaliga tillukku við 12 ára degnum. Alt tað besta.
**Ynskja mamma og babba**



**Til gubba**
Hjartaliga tillukku við 25 ára degnum, gleða okkum at sleppa í tivoli á Jóansøku.
**Heilsan Heiðrun og Jóhan**



**Allarbesti babba**
Hjartaliga tillukku við degnum 28. juni. Takk fyri alt tú ert fyri okkum.
**Heilsan Hallur, Rani og Tóki**



**Góði Boje**
Hjartaliga tillukku á 50 ára degnum. Tú ert ikki nógv broyttur hesi ár.
**Heilsan EMHMSTM**




**Føðingardag ella ikki**
Tú má aftur upp á jakt allíkavæl á Jóansøku.
Minnist tú tá eg mátti smakka »kølluna« á nýggjárinum?
**Tillukku við 1/4 hundrað TXXX**



**Jákup fingið kortið!**
Góði Jákup, hjartaliga tillukku við kortinum, altso stóra koyrikortinum...
**Heilsan babba**



**Kári og Katrin**
Góðu tit bæði. Hjartaliga tillukku við prógvunum
**Heilsan omma**



**Góði elskaði Jacob**
Hjartaliga tillukku við 12 ára degnum (her ert tú cool). Jesus signi framtíð tína.
**Ynskir omma**



**Góði Hensar!**
Tillukku við runda føðingardegi tínum í dag 29. juni.
Tað eru nøkur ár runnin síðani hendan myndin var tikin, og sum ikki einaferð, eru vit á veg í býin at partrola.
Takk fyri títt stóra vinsemi ígjøgnum allar tíðir.
Góði Hensar, eg ynski tær alt gott í framtíðini.
**Heilsan Hildibrandur**



**Góða fitta Halldis**
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum 29. juni.
**Muss og klemm frá mammu og babba**



**Góða fitta Emma**
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum tann 1. juli. Vit elska teg.
**Heilsan mamma, babba, Henning og Uni**



**Eydna, Ata og Vivian**
Hesar smekru diddurnar hava júst fingið studentarhúgvuna. Tillukku við tí, og alt tað besta í framtíðini!!!
**Heilsan ein vinkona**



Eg og foreldur míni takka hjartaliga tykkum, sum gleddu meg á fermingardegi mínum 24. mars 2002.
**Heilsan Anna Christina Brink Dalsgaard**



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið gleddu okkum á hjúnabandsdegi okkara 13. apríl 2002.
**Meinhild og Bogi Kallsberg**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:............................................................
............................................................
............................................................
............................................................
............................................................
............................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ............................................................
Bústaður: ............................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«